# ur



*At arbeiðið hjá einum umsjónarmanni á Eiði er víttfevnd, kann Arthur skriva undir uppá. Mynd: Snorri Brend*

> *Tann sum skal arbeiða hjá kommununi, má bæði kunna grava gravir og tapetsera*
>
> *(Jógvan í Løðuni, Eiði)*

> *Jú, vit fáa so sanniliga dagin at ganga*
>
> *(Arthur Ellingsgaard, Eiði)*

## Frá einum til hitt

**Er tað nakað sum sermerkir arbeiðið hjá Arthuri og hansara monnum, er tað fjølbroytni. Teirra arbeiðsdagur er ongatíð eins.**

**Ta einu løtuna kunnu teir rudda í bygdini. Eina aðra løtu kemur ein fráboðan um eina tipta rennu. Ta næstu eru teir í lítlu viðarlundini í Múlavík. Í teirri triðju er teir í gongd við okkurt viðlíkahaldsarbeiði ella kloakkarbeiði í bygdini.**

**Og í teirri fjórðu er Arthur í ferð við at sláa grasið í kirkjugarðinum. Her hittu vit hann ein vakran mikudag í farna mánaði.**

**- Ja, Jógvan í Løðuni segði einaferð, at "tann sum skal arbeiða hjá kommununi, má bæði kunna grava gravir og tapetsera". Hetta er jú eitt rættiliga langt lop.**

**- Men tann sum arbeiðir hjá eini kommunu, má vera alsidigur og duga bæði eitt og annað. Spyrt tú meg um eg havi tapetserað, ja, so havi eg tað!, sigur Arthur við einum brosi.**

grasið saman, og flyta tað á eitt ávíst stað. Síðani kemur ein lastbilur eftir tí og koyrir grasið á rætta stað.

### Frá einum degi til hin

Arthur er tó ikki einsamallur í arbeiði sínum. Saman við sær hevur hann tveir aðrar mans. Men tá hava teir eisini hinar bygdirnar í kommununi – Ljósáir og Svínáir - undir sær.

Arbeiðið teirra er víttfevnt, men Arthur plagar tó at halda seg til eina ávísa ætlan hvørja viku. Millum annað hyggur hann mánadag og fríggjadag eftir ruskplássunum í hesum báðum bygdunum.

- Í dag eri eg altso her í kirkjugarðinum, meðan hinir báðir eru niðri við havnarlagið beint nú, greiðir hann frá.

Við havnarlagið eru menn í ferð við at taka eitt alibrúk sundur. Sannlíkt er at okkurt av tí kann verða brúkt til bátabrúgvar, millum annað flotini og tilíkt.

Sum er, veit Arthur ikki um nakað størri arbeiði liggur fyri framman í kommununi. Tí sum hann sigur:

- Hjá okkum er tað líkasum eitt arbeiði frá einum degi til tann næsta!



*Kirkjugarðurin verður sligin fleiri ferðir um árið. Teir eru sera umhygnir í arbeiðinum, soleiðis at grasið verður spulað av aftur gravsteinunum. Mynd: Snorri Brend*